FAROESE DISABILITY ORGANIZATIONS

Fíggjarmálaráðið
Tinganes
Postrúm 2039
FO-100 Tórshavn

Staður: Tórshavn
Dagfesting: 15.10.2025
Ummælistíð: 17.09.2025 til 15.10.2025
J. nr. (MEGD): 701-8-2025
J. nr. (FMR): 25/14821

Hoyringarskriv
til uppskot til løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um landsins játtanarskipan
(Hámark fyri rakstrarútreiðsluvøkstri og løguætlan)

MEGD takkar fyri høvið at senda hoyringarskriv til nevnda uppskot,
og fyri ein góðan kunnandi fund við Fíggjarmálaráðið.

Kanna grundarlagið undir almennu fíggjarstýringini

1. Umfatandi royndir innan almenna fíggjarstýring og gransking vísa, at langtíðar búskaparligur vøkstur kann ikki tryggjast, um almenn fíggjarstýring burturav tekur støði í *peningaligum* ávísum (indikatorum), her undir Brutto Tjóðar Úrtøku (*BTÚ*).[i] Royndir og gransking vísa hinvegin, at langtíðar búskaparligur vøkstur er úrslit av einum javnvági og samvirknaði millum búskaparligan vøkstur, vælferð og umhvørvið.[ii]

Fyriliggjandi uppskot, sum er liður í ætlanini at tryggja langtíðar búskaparligt haldføri,[iii] hevur ítøkiliga til endamáls at seta hámark fyri, hvussu nógv útreiðslurnar hjá landinum til rakstur kunnu vera, millum annað fyri at tryggja framtíðar vælferð. Einasti ávísin, ið uppskotið nýtur, er *BTÚ*. Einki er tó nevnt um júst hvussu langtíðar javnvágur skal tryggjast millum framtíðar inntøkur og útreiðslur, og harvið hvussu framtíðar vælferðin verður ment ella tryggjað.

Um fíggjarpolitisk átøk, her undir fíggjarstýring og eftirmetingar, einans fara at taka støði í *BTÚ*, uttan at ítøkilig langtíðar mál samstundis verða sett innan vælferðina, verður sostatt ivasamt, um vælferðin veruliga kann mennast og framtíðartryggjast. Hetta fer helst at merkja økt sannlíkindi fyri neiligum avleiðingum á vælferðarsamfelagið, her undir afturstigum í rættindum hjá fólki, ið bera brek. Týðandi ábendingar eru tískil um, at fyri at framtíðartryggja vælferðina eru grundleggjandi fyrimunir við at allýsa og breiðka grundarlagið undir almennu fíggjarstýringini, her undir teir ávísar, ið verða brúktir.

Tískil verður mælt til at kanna teir fyrimunir, ið tað sannlíkt hevði givið, at allýsa og breiðka grundarlagið undir almennu fíggjarstýringini til at fevna breidri enn einans peningalig atlit. Faklig grundarløg, ið eiga at verða kannað nærri, eru eitt nú *OECD Well-Being Framework*[iv] og *Doughnut Economy*.[v] Samstundis eigur at verða kanna nærri, hvussu m.a. hesi grundarløg kunnu tillagast til føroysk viðurskifti.

MEGD
Íslandsvegur 10 C
FO-100 Tórshavn
Faroe Islands

Tel: +298 317373
Týsdag, mikudag og hósdag kl. 10 – 15
megd@megd.fo
www.megd.fo

Skipanin fyri avleiðingagreining eigur at verða styrkt

2. Avleiðingagreiningar[vi] kunnu vera við til at tryggja dygd og góðsku í átøkum, verkætlanum, lógum og skipanum, m.a. í mun til almenna fíggjarstýring og vælferðartænastur.[vii] Ein høvuðsorsøk til hetta er, at avleiðingagreiningar kunnu stuðla undir hjá teimum, ið taka bæði politiskar og umsitingarligar avgerðir, bæði í mun til upplýsing, kjak og greiningar av viðkomandi málum, m.a. í mun til fíggjarstýring og vælferðartænastur.[viii] Sambært OECD kunnu avleiðingagreiningar eisini styrkja vitanarstøðið og góðsku í lóggávu og skipanum, her undir rættindi og almenna fíggjarstýring.[ix]

Sambært heimsbankanum hava búskaparliga sterk lond lutfalsliga sterkar skipanir fyri avleiðingagreining, meðan búskaparliga veik lond hava lutfalsliga veikar skipanir fyri avleiðingagreiningar.[x] Um vit samanbera við grannalond okkara,[xi] hevur Føroyar tó hvørki lóg ella kunngerð, ið skipar og samskipar arbeiðsgongdina fyri avleiðingagreining m.a. við nøktandi starvsfólkaorku. Hetta kann merkja veikari ella manglandi samstarv og samskifti millum viðkomandi partar tá lóggáva og skipanir verða orðað. Ítøkiliga kann hetta eisini merkja at almenna fíggjarstýringin gerst óneyðuga viðkvom ella veik.

Rundskrivið um lógarsmíð hjá landsstýrinum hevur viðkomandi ásetingar,[xii] men avbjóðingar tykjast at standast m.a. í sambandi við stórar og krevjandi avleiðingagreiningar, ið krevja samstarv tvørtur um geirar. Ein nýggj lóg ella kunngerð kundi skipað hesa tilgongd greiðari, m.a. soleiðis at viðkomandi partar, eitt nú aðalráð og kommunur, í felag gera neyðugar greiningar, bæði av fíggjarligum og sosialum avleiðingum, m.a. á lógartryggjað rættindi. Harumframt átti nøktandi starvsfólkaorka at verið sett til taks. Hetta hevði sannlíkt ført til sterkari góðsku í lógum og skipanum, eitt nú innan almenna fíggjarstýring, sum eisini hevði verið ein greiður fyrimunur í mun til burðardygd, rættindi og langtíðar haldføri í búskapinum. Bæði álit og trúðvirði av uppskotum kundi samstundis verið styrkt. Lutfalsliga lítlir búskapir, sum hin føroyski, eru lutfalsliga veikir og viðkvæmir í mun til altjóða rembingar, her undir búskaparligar kreppur.[xiii] Tískil hevði tað helst verið gagnligt, um føroyskir myndugleikar raðfestu avleiðingagreiningar lutfalsliga høgt.

Eisini eru fyrimunir við at taka feløgini hjá fólki, ið bera brek, við upp á ráð í avleiðingagreiningum, m.a. tí tey við støði í lívsroyndum og servitan kunnu ráðgeva um, hvussu vælferðarskipanir virka í gerandisdegnum hjá fólki. Hetta er týðandi liður í at meta um avleiðingar av m.a. politiskum ætlanum, lógaruppskotum ella skipanum, her undir t.d. javnvágin millum langtíðar inntøkur og útreiðslur, og økir samstundis eisini um virðingina fyri tí einstaka menniskjanum.[xiv] Ráðførsla við feløgini kann, sum heild, verða við til at styrkja burðardygdina í vælferðarskipanum og betra um álitið á almennar ætlanir og átøk.[xv]

Á hesum grundarlagi verður mælt til at kannað nærri, um tað hevði sømt seg at styrkt skipanina fyri avleiðingagreining eitt nú hjá landsstýrinum og undirliggjandi stovnum, sum t.d. hjá Almannaverkinum, Heilsuverkinum og hjá Landsverki, og hjá kommununum. Aðrir viðkomandi partar kunnu vera Hagstovan, Fróðskaparsetur Føroya, Landsbankin, Búskaparráðið, feløg og Brekumboðið.

MEGD
Íslandsvegur 10 C
FO-100 Tórshavn
Faroe Islands

Tel: +298 317373
Týsdag, mikudag og hósdag kl. 10 – 15
megd@megd.fo
www.megd.fo

Grundleggjandi fyrimunir við langtíðar vælferðarætlan

3. Sambært altjóða brekrættindasáttmálanum eiga rættindi hjá fólki, ið bera brek, at verða ment stigvís, og afturstig í rættindum eiga ikki koma fyri, uttan so at sera góðar orsøkir tala fyri tí, sum byggja á kanningar.

Fyri at tryggja stigvísa menning í rættindum og virðing fyri menniskjanum, og fyri at betra um grundarlagið fyri langtíðar búskaparligum vøkstri,[xvi] tykjast grundleggjandi fyrimunir at vera við eini langtíðar brekpolitiskari virkisætlan - ella langtíðar vælferðarætlan - ið m.a. ásetur mál, ávísar (indikatorar) og neyðuga fígging, ið skal til fyri at íverkseta málini.

Hóast ein langtíðar heilsupolitikkur tíbetur verður gjørdur,[xvii] hevur Føroyar tíverri, eins og nógv framkomin lond,[xviii] ongantíð havt nakra langtíðar brekpolitiskari virkisætlan ella vælferðarætlan. Sostatt er øktur váði fyri at vælferðarøkið ikki fer at mennast á skipaðan og áhaldandi hátt og harvið verður framtíðartryggjað, m.a. tá hámark verður sett við almennu rakstrarrútreiðslurnar áljóðandi 1% av BTÚ, og løguætlanir og løgukendar ætlanir fara at vera avmarkaðar sambært langtíðar ætlan, ið burturav byggir á peningaligar ávísar.

Grundleggjandi tørvur tykist tískil at vera á eini langtíðar vælferðarætlan, ið byggir á breitt samstarv millum viðkomandi partar, her undir politiskar flokkar, myndugleikar, fakfeløg og umboðandi feløg. Hetta er ikki minst viðkomandi nú arbeitt verður við nýskipanum m.a. innan vælferðarøkið.

Mælt verður til at kanna teir grundleggjandi fyrimunir, ið tað helst hevði givið fyri føroyska vælferðarsamfelagið, um ein langtíðar vælferðarætlan verður smíðað við breiðari semju millum allar viðkomandi partar. Langtíðar ætlanin kann helst verða samskipað við langtíðar løguætlanina sambært uppskotinum.

Ein langtíðar vælferðarætlan kann eisini m.a. vera við til at tryggja javnvág millum átøk, ið hava til endamáls at menna langtíðar búskaparligt haldføri, her undir hetta uppskotið og framtíðar vælferðartænastur.

Tá fíggjarlógin verður smíðað og viðgjørd í tinginum, og møguliga tá Búskaparráðið eftirmetir almennu fíggjarstýringina fyri undanfarna ár, eiga atlit at vera tikin til hesa langtíðar vælferðarætlan.[xix]

Dømi um langtíðar mál – Ein rúmligari arbeiðsmarknaður yvir 10 ár gevur stóran samfelagsbúskaparligan vinning
Ein samfelagsbúskaparlig greining úr Noregi frá 2023 vísur,[xx] at um arbeiðsmarknaðurin fær 15% fleiri fólk við breki í starv yvir eitt 10 ára skeið verður samfelagsbúskaparligi vinningurin áleið 27 milliardir norskar krónur. Orsøkirnar eru m.a. betri heilsa og færri heilsutænastur, betri trivnaður og færri stuðulstænastur og øktar skattainntøkur.

MEGD
Íslandsvegur 10 C
FO-100 Tórshavn
Faroe Islands

Tel: +298 317373
Týsdag, mikudag og hósdag kl. 10 – 15
megd@megd.fo
www.megd.fo

Feløgini takast upp á ráð

4. Uppskotið um eitt fíggjarpolitiskt regluverk gevur, sum tað stendur, einki ítøkiligt svar uppá, um ella hvussu t.d. játtanin til MEGD ella limafeløg, ið fáa játtan umvegis fíggjarlógina, verða ávirkað ella fara at blíva ávirkað í framtíðini.

Vit vilja tó undirstrika týdningin av, at eitt tílíkt regluverk ikki minkar um ella á annan negativan hátt ávirkar árligu játtanina til MEGD og tey limafeløg, ið eru á fíggjarlógini.

Bæði meginfelagið og limafeløgini, sum eru á fíggjarlógini, eru longu sum er ógvuliga viðkvom og trýst fíggjarliga. Tað er tí av alstórum týdningi, skulu feløgini yvirliva, at hesi framvegis fáa fíggjarligan stuðul.

MEGD og tey limafeløgini, ið kunnu verða ávirka av broytingum á fíggjarlógini í ár ella komandi árini vænta og vóna, at vit verða hoyrd, áðrenn ítøkiligar ætlanir, sum kunnu ávirka, verða framdar í verki.

Vinaliga vegna MEGD,

Ása Olsen
forkvinna

Bárður Atlason Ísheim
aðalskrivari

MEGD
Íslandsvegur 10 C
FO-100 Tórshavn
Faroe Islands

Tel: +298 317373
Týsdag, mikudag og hósdag kl. 10 – 15
megd@megd.fo
www.megd.fo

FAROESE DISABILITY ORGANIZATIONS

Keldulisti

[i] Sí m.a. Jansen, A., Wang, R., Behrens, P., & Hoekstra, R. (2024). Beyond GDP: A review and conceptual framework for measuring sustainable and inclusive wellbeing. The Lancet Planetary Health, 8(9), e695– e705. https://doi.org/10.1016/S2542-5196(24)00123-5; ella OECD. (2019). The economy of well-being: Creating opportunities for people's well-being and economic growth, https://www.oecd.org/els/soc/EGOV_Social_well-being; ella Wellbeing economy: Investments in social justice and future generations. Mesiäislehto, Merita; Hiilamo, Heikki; Kestilä, Laura (2025-06), www.julkari.fi/handle/10024/151629, har vit síggja á síðu 8-10 dømi um lond, ið hava breiðkað almennu figgjarstýringinga til at fevna breidri enn einans *peningalig* atlit.

[ii] Somu keldur sum áður.

[iii] Sí m.a. https://www.buskaparradid.fo/fo/figgjarpolitiskt-haldfoeri og https://www.fmr.fo/fo/kunning/tidindi/atoek-og-regluverk-tryggja-betri-haldfoeri.

[iv] Sí m.a. https://www.oecd.org/en/topics/policy-issues/well-being-and-beyond-gdp.html og OECD. (2019). The economy of well-being: Creating opportunities for people's well-being and economic growth. https://www.oecd.org/els/soc/EGOV_Social_well-being.pdf. Sí dømi um figgjargreining hjá OECD av Covid-19 kreppuni við støði í vælferðar (*well-being*) indikatorinum: OECD (2021), *COVID-19 and Well-being: Life in the Pandemic*, OECD Publishing, Paris, https://doi.org/10.1787/1e1ecb53-en.

[v] Sí t.d. Raworth, K. (2017). Why it's time for Doughnut Economics. IPPR Progressive Review, 24(3), 216–222.

[vi] Á donskum *konskvensanalyser*, á enskum *Regulatory Impact Assessments*. Nyttumetingar (*cost-benefit analysis*) kann skiljast sum eitt ávíst slag av avleiðingagreing.

[vii] Sí *Guidelines on Democratic Lawmaking for Better Laws*. OSCE Office for Democratic Institutions and Human Rights (ODIHR), 2023. www.osce.org/odihr/558321.

[viii] Sí t.d. Rantala, K., Alasuutari, N. and Kuorikoski, J. (2024), The logic of regulatory impact assessment: From evidence to evidential reasoning. Regulation & Governance, 18: 534-550. https://doi.org/10.1111/rego.12542

[ix] Sama kelda sum áður.

[x] *Global Indicators of Regulatory Governance: Worldwide Practices of Regulatory Impact Assessments (English).* Washington, D.C.: World Bank Group. http://documents.worldbank.org/curated/en/905611520284525814. Sí síðu 5.

[xi] Sí til samanberingar skipanir fyri avleiðingagreinaingar í Noreg (Guidance notes on the Instructions for Official Studies of Central Government Measures), Danmark (VEJ nr 9319 af 07/05/2018, Vejledning om konsekvensanalyser; https://www.retsinformation.dk/eli/retsinfo/2018/9319) og hjá ES (Better regulation: guidelines and toolbox, https://commission.europa.eu/law/law-making-process/better-regulation/better-regulation-guidelines-and-toolbox_en).

[xii] Sí Rundskriv nr. 9001 frá 2. november 2018 um rundskriv um lógarmíð, serliga parturin um *Avleiðingarnar av uppskotinum* undir *1.2.2. Kapittul 2*. Eisini er viðkomandi at nevna, at sambært rundskrivinum um lógarsmíð skulu avleiðingar av kunngerðaruppskotum ikki lýsast, eins og tær vera í lógaruppskotum. Tó hava kunngerðir í mongum førum týðandi rættarstøðu og avleiðingar við sær, her undir almennar útreiðslur. Kunngerðaruppskot eiga sostatt at verða avleiðingagreinað, eins og lógaruppskot. Hetta er eisini viðkomandi í mun til eftirlit og almenna figgjarstýring.

[xiii] Sí eitt nú útgávur og virksemið hjá *Centre for Small State Studies* á Háskúla Íslands, https://ams.hi.is/en/centre-for-small-state-studies/publications/; Sí eisini Rachael Lorna Johnstone and Aðalheiður Ámundadóttir, 'Defending Economic, Social and Cultural Rights in Iceland's Financial Crisis' (2011) 3 The Yearbook of Polar Law 455. Og Rachael Lorna Johnstone and Aðalheiður Ámundadóttir, 'Human Rights in Crisis: Securing the International Covenant on Economic, Social and Cultural Rights (ICESCR) in Economic Downturns' (2013) 1 International Journal of Human Rights and Constitutional Studies 6.

[xiv] Fakligar vegleiðingar innan lógarsmíð hjá eitt nú OECD mæla til at taka áhugafeløg upp á ráð, m.a. í sambandi við avleiðingagreiningar, sí s. 86-95 í *Guidelines on Democratic Lawmaking for Better Laws*. OSCE Office for Democratic Institutions and Human Rights (ODIHR), 2023. www.osce.org/odihr/558321.
Ástøðið innan lógarsmíð mælir eisini til avleiðingagreiningar, sí m.a. Xanthaki, H. *Thornton's Legislative Drafting*. BLOOMSBURY PROFESSIONAL. 5. útg. 2022. Kapitul 22, síða 560-569.

[xv] Sí grein hjá MEGD frá 1. oktober 2024, "Limafeløgini styrkja búskaparliga haldførið".

[xvi] Sí tilmælið omanfyri á síðu 1 um Grundarlagið undir almennu figgjarstýringini.

[xvii] https://www.hmr.fo/fo/kunning/tidindi/sidsta-hond-verdur-loegd-a-heilsupolitikkin-fyri-foeroyar

[xviii] Sí yvirlit yvir langtíðar menningarætlanir, virkisætlanir og strategi'ir hjá londum, ið viðvíkja vælferð og rættindi hjá fólki, ið bera brek: https://www.un.org/development/desa/disabilities/strategies.html.

[xix] Sameindu Tjóðir (ST) hevur útgivið viðkomandi frágreiðing um hvussu figgjarlógir eiga at taka atlit til rættindi, sí Realizing Human Rights through Government Budgets; ST hevur eisini gjørt vegleiðingar til hvussu lond kunnu taka atlit til rættindi í figgjarlógum, sí m.a. Guidelines for Disability – Inclusive Budgeting.

[xx] Sí Sveinung Legard, Saliha El-Amrani og Audun Gleinsvik (2023) Samfunnsøkonomiske gevinster ved økt sysselsetting av personer med funksjonsnedsettelse – en oppdatert analyse (oda. oslomet.no) AFI-rapport 2023:13. Sí eisini https://www.bufdir.no/statistikk-og-analyse/funksjonsnedsettelse/funk-arbeid/.

MEGD
Íslandsvegur 10 C
FO-100 Tórshavn
Faroe Islands

Tel: +298 317373
Týsdag, mikudag og hósdag kl. 10 – 15
megd@megd.fo
www.megd.fo